inni - trygt og ómaksleyst til hús



## Grundøki – Havragerði 4, Tórshavn

Stórt grundøkið, stødd 531 fermetrar. Stykkið er sera slætt og lætt at slætta og planera, og annars klárt at byggja á. Liggur á blindvegi, beint við handil, dagstovn og skúla. Skjótt til gongu heim í býin.
Um hóskandi boð fæst.



## Sethús – Niels Finsensgøta 47, Tórshavn

Samanbygdu húsini eru í 3 hæddum á 38 m2 – í alt 114 m2. Húsini eru upprunaliga bygd í 1914, men eru umvæld, bjálvað og dagførd so við og við. M.a. er hetta nýliga gjørt: vindeygu, tak, vatninnføring, frárensl / kloakk, gólv í stovuni, bjálvað á loftinum o.a., so húsini nú eru í góðum standi. Í miðhæddini er inngongd, køkur, borðsstova / stova. Í ovastu hædd er trappugongd, hjúnarrúm, baðirúm og 2 kømur. Í niðastu hædd er vaskirúm / fýrrúm / kjallararúm. Húsini standa í huganligum, friðarligum og veðurgóðum umhvørvi við høvuðshandilsgøtu mitt í býnum. Stutt er til dagstovnar, skúlar, handlar – ja alt. Nakað av útsýni er yvir býin úr ovastu hædd.

**Prísuppskot : 1.800.000,00**



## Randarhús – Niðaragøta 58, Hoyvík

Góð randarhús í trimum hæddum á 44+44+37 - í alt samlað búvídd á uml. 125 fermetrar. Miðhæddin: durur, gongd, trappa upp á loftið og niður í kjallarin, køkur / spísistova / stova. Ovasta hædd: hjúnarrúm, baðirúm, kamar og stórt rúm úti á loftinum. Niðasta hædd: gong, tvey kømur, wc og kjallar/vaskirúm við hurð út í garðin. Húsini liggja væl fyri í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi og hava sera gott útsýni inn á Skálafjørðin, norður í Sundalagið og yvir Nólsoyarfjørð. Hartil er gott busssamband oman í býin. Húsini eru sera væl hildin og í góðum standi. Byggiár: 1998 - Grundøkið er 300 fermetrar til víddar.

**Prísuppskot: kr. 2.000.000,00.**



## Sethús – undir Heygnum 6, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum á 75 $m^2$ – í alt 150 $m^2$. Grundøkið er 408 $m^2$. Byggiár: 1964, men húsini eru dagførd nakað so við og við. Í neðra er inngongd, durur, gongd, lítil stova, 3 kømur og vaskirúm / fýrrúm. Í erva er trappugongd, køkur, baðirúm og 5 kømur. Systemlás er á øllum hurðum, og sengur eru í øllum kømurum. Húsini standa í friðarligum umhvørvi við góðum útsýni og stutt er til dagstovnar, bussleið o.a.

**Prísuppskot : 2.200.000,00**



## Grundøki – Velbastað, Velbastaður

Grundstykkið liggur í nýggjari útstykking matr. 24 ab , klárt at planera, avtala er gjørd um "privata" planering um komandi keypari ynskir at fara í gongd beinavegin. Stykkið liggur væl fyri á blindvegi. Nýggi býlingurin liggur omanfyri bygdina Velbastaður, sum er ein gomul bóndabygd, útsýnið verður púra frítt omanfyri gomlu bygdina, út á Hestur, Koltur og Sandoynna. 10. min. í bili til Havnar. Tætt við dagstovn, skúla og busstoppstað.

**Prísuppskot: kr. 800.000,00.**



## Sethús – Norðskálavegur 44, Norðskáli

Snotiligu húsini eru í 2 hæddum, hvør hæddin er 140 m2 - íalt 280 m2. Í ovaru hæddini er gongd, stórur køkur og stova í einum, bryggers/vaskirúm, hjúnarúm, kamar, klædnarúm og baðirúm. Niðara hæddin er óinrættað.
Húsini eru eini snotilig og sera væl bygd hús, sum FT smíð hevur bygd, tað er betongdekk millum hæddirnar, og varmi í øllum gólvunum. Byrjað er at gera garagu, sum verður umleið 50 m2. Byggiár : 2005 . Grundøkið er : 749 m2. Húsini standa væl fyri, stutt er til allar hentleikar, har er veðurgott og sera gott útsýni.

**Prísuppskot : 1.700.000**



## Raðhús – 3 íbúðir
## J. Paturssonargøta 17, Tórshavn

Húsini, ið hava 3 íbúðir, eru í 3 hæddum á 53 $m^2$ - í alt 159 $m^2$. Grundøkið er 142 $m^2$. Byggiár: 1960. Nakrar dagføringum eru gjørdar. Í miðhæddini er inngongd, gongd, køkur, stova, baðirúm og 2 kømur. Í ovastu hædd er trappuuppgongd, gongd, køkur, stova, baðirúm og 2 kømur. Í niðastu hædd er inngongd, gongd, køkur, stova, baðirúm, fýrrúm og 2 kømur. Framman fyri húsini er garður / urtagarður. Húsini standa í veðurgóðum umhvørvi nær miðbýnum, og nakað av útsýni er í ovastu hædd. Stutt er til dagstovnar, skúlar, lærustovnar og handlar, og alt er beint við hondina.

**Prísuppskot : 2.100.000,00**



## Grundstykki – Bøkjarabrekka 7, Tórshavn

Grundøkið matr. nr. 413a Tórshavn, sum er á 200 $m^2$, liggur sera væl fyri í miðbýarbyggiøki við høvuðshandilsgøtuna mitt í miðbýnum í Havn. Grundøkið kann gagnnýtast fult út við tað, at byggjast kann í 1 hædd undir jørð, 2 hæddum yvir jørð + takíbúð á 75% av byggiøkinum – tilsamans uml. 700 $m^2$.

**Prísuppskot 2.000.000**



## Virkisbygningur – Ritivíkshálsur, Rituvík

Stórur vinnubygningur á Rituvíkshálsi. Bygningurin er í einari hædd við innskotum dekki í parti av bygninginum, veghæddin 893 fermetrar og innskoti dekk 587 fermetrar, íalt gólvídd 1.480 fermetrar. Grundøkið 5.209 fermetrar. Byggiár 2002. Høllin er vælegna til vørugoymslu, handil og annað vinnuligt endamál, eisini er møguleiki at byggja út upptil 3000 fermetrar. Afturat goymslurúmi er fýrrúm og toilett. Frá veghæddini er galv. stáltrappa upp til innskotnað dekkið. Alt uttanumsøki er javnað og asfalterað. Kring alt økið er uppsett stik úr galv. Stáli og stálsúlum. Bygningurin liggur sera væl fyri, lætt atkomuligur við stórum akførum. Bygningurin er í sera góðum standi, væntar ongar ábøtur. Ognin hevur ein trý ára leigusáttmála. Um hóskandi boð fæst.



## Tvíhús – Skørugøta 6, Tórshavn

Tvíhús i tveimum hæddum, 72 fermetrar hvør hæddin, samlað búvídd á uml. 174 fermetrar. Veghæddin: durur, gongd, baðirúm, hjúnarúm, 2 kømur, trappa til miðhædd og fýrúm /vaskirúm. Ovara hæddin, gong, kamar, wc, køkur, stova. Húsini eru sera væl hildin og í góðum standi, liggja frítt fyri í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi og útsýni út á fjørðin. Tætt við dagstovn, handil og gundadal, busssamand er gott.

**Prísuppskot : 2.100,000**



## Sethús Haraldstrøð 12, Tórshavn

Stór væl bygd sethús við garajsu - mitt í Havnini, 10 min. heim á Vaglið. Húsini eru í tveimum hæddum, hvør hæddin uml.150 fermetrar í alt samlað búvídd á uml. 300 fermetrar. Byggiár 1968, umvæld 1986. Veghæddini: durur, gong / trappa til kjallara, køkur, spísustova, sjónvarpsstova og stova, hjúnarrúmvið klædnarrúm og baðirúm við brúsu. Kjallarahæddin: sjálvstøðug íbúð við egnari inngong: durur, gong, køkur, stova, trý kømur, baðirúm við brúsu, trappa upp til veghædd, vaskirúm/kjallararúm við oljufýr. Garagan er innrættað við hjalli og goymslurúm. Húsini liggja sera væl fyri á einum friðarligum blindum vegi, uttast á tromini, við sera góðum útsýni yvir Havnina. Hugnaligur utagaður við runnum og giring kring húsini. Byggiár: 1968 - Grundøkið er 400 fermetrar til víddar.

**Prísuppskot: kr. 2.800.000,00.**



## Sethús – Rygsgøta 4, Argir

Húsini eru í 2 hæddum á 72 $m^2$ og loft á uml. 60 $m^2$ - í alt uml. 204 fermetrar. Grundøkið er 499 m2. Byggiár: 1992. Í miðhæddini er inngongd, durur, hall við upp- og niðurgongd, gestawc, borðsstova / stova / hugnastova, køkur / alrúm og kovi. Í ovastu hædd er trappugongd, gongd, hjúnarrúm við útgongd til altan, barðirúm við brúsu og baðikari og 2 kømur. Í niðastu hædd er inngongd, vaskirúm, fýrrúm / kjallararúm í fullari loftshædd, ið kann innrættast. Húsini standa í veðurgóðum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg. Útsýnið er frálíkt yvir Havnina og fjørðin – panorama av loftinum. Stutt er til dagstovn og skúla (nýggjur skúli verður bygdur nær við). Busssambandið er gott og nýtt vegasamband við nýggjum ringvegi verður í næstum.

**Prísuppskot : 2.300.000**



## Grundøki – Hvarvið 7C, Tórshavn

Grundstykkið, sum liggur heilt einastandi væl fyri í gangiavstandi frá býnum, er 610 m2 til víddar og er væl egnað til at byggja sethús á. Vegur er til stykkið, og tað er lætt at gera byggiklárt. Grundstykkið liggur í nýggjari útstykking í vøkrum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg út til friðað øki. Stutt er til skúlar, stovnar og handlar. Útsýnið er einastandandi gott yvir alla Havnina og út á fjørðin, og einki kemur upp fyri.

**Prísuppskot: kr. 1.300.000,00.**



## Sethús – Hvíggjarv. 11, Oyndarfjørður

Húsini eru í 2 hæddum. Samlað búvídd 180 m2. Í húsinim er innbygdur hjallur. Í ovaru hæddini er, durur, hjallur, gongd, 2 kømur, baðirúm, køkur, stova og niðurgongd til niðaru hæddina.Í niðaru hæddini er, kjallarúm/fýrrúm/ vaskirúm, wc og eitt kamar. Húsini standa mitt í bygdini, har er veðurgott, barnavinarligt og gott útsýni. Tey eru sera væl egnaði sum summarhús.

**Prísuppskot: kr. 780.000,00**



## Raðhús – Jørundargøta 39, Hoyvík

Snøggu og hugnaligu endaraðhúsini eru í 2 hæddum – niðara hædd uml. 80$m^2$ – ovara uml. 60$m^2$ – í alt uml. 140$m^2$. Grundøkið er 303m2. Byggiár: 1999. Í niðaru hædd er inngongd, gongd / bryggers, køkur / alrúm / borðsstova / stova við útgongd, millumgongd / skápsrúm, baðirúm, kamar og sjálvstøðug inngongd og trappugongd / durur til ovaru hædd. Í ovaru hædd er sjálvstøðug íbúð. Har er trappupallur / køkur / stova, baðirúm og 3 kømur. Kvistur kann byggjast á takið. Húsini standa í veðurgóðum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg og hava gott útsýni. Stutt er til spælipláss, dagstovnar, skúlar og nýggja umhvørvið við Karlamagnusarbreyt.
Um hóskandi boð fæst.



## Sethús – Oysvíksvegur 12, 750 Viðareiði

Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvídd uml. 270 fermetrar íroknað garasju í niðara hæddini. Grundøkið er uml: 610 fermetrar. Byggiár: 1972. Húsini hava hava stoypta grund, eru klødd við plastikk plátum, hava trævindeygu og jarntak. Í ovaru hædd er gong, køkur, stór stova, baðirúm, hjúnarrúm og 2 kømur. Í niðaru hædd er gong, 2 kømur, goymslurúm, arbeiðsrúm, fýrrúm, hjallur og garaga. Giring við grasplenu er kring húsini. Húsini standa í friðarligum og natúrvøkrum umhvørvi. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni

Sosialurin